


## Legendan vann á 10.000 m

Aldurin tykist ikki vera nøkur forðing hjá nú 41 ára gamla Kim Godtfredsen. Í oyggjaleikahøpi er hann mest sum ein legenda á meðal og longru teinunum, og aftur hesa ferð livdi hann upp til vónirnar. Í fyrstu kappingini, sum var á hálvum marathon vann hann silvur, og í morgun gjørdist tað so til gull, tá hann kappaðist á 10.000 metra teininum. Talan var um sera sannførandi sigur, har Godtfredsen púrasta einsamallur kom inn á mál.

# Heiðursmerki eru ikki alt

**Føroyska borðtennislandsliðið, sum er fyri einum ættarliðsskifti, fekk einki heiðursmerki við sær av Rhodos**

BORÐTENNIS
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Hesa ferð eydnaðist ikki hjá Kjartani Eli at vinna heiðursmerki til Føroyar. Men unga føroyska liðið vann sær hópin av góðum royndum á oyggjaleikunum á Rhodos*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Við fyrst og fremst Kjartan Eli Hentze, men tó eisini við øðrum kreftum, hevur borðtennisliðið altíð havt okkurt skreyt heimaftur við sær seinastu oyggjaleikir.

Boðini undan leikunum hesa ferð vóru tó fyrst og fremst, at nú skuldi hyggjast frameftir, og tí var tað sum so ikki nakað vónbrot, at einki kom við í skjáttuna hesaferð.

Tvørturímóti, so var tað gleðast um, at Susie Midjord, Rakul Mikkjalsdóttir og Marin í Dali allar tríggjar komu víðari úr bólkaspælinum og í 1/8-finalurnar.

Her tpatu tær tó allar tríggjar. Susie tapti 3-1 fyri eini kvinna av Orkney. Rakul tapti somuleiðis 3-1 fyri einari av Guernsey, og Marin í Dali tapti 3-0 móti sterkum spælara av Gotlandi.

Og úrslitini vísa uttan nakað hóvasták, at framgongdin hevur verið stór á kvinnusíðuni. Í liðkappingini fingu føroysku kvinnurnar eisini fleiri góð úrslit, og tí verður spennandi at fylgja við, hvussu menningin verður komandi árini.

**Styrkt Rhodos-lið**

Hjá monnunum var tað sum ikki einaferð Kjartan Eli Hentze, sum bar vónirnar um heiðursmerki.

Vertirnir av Rhodos hava tó styrkt um sítt líð við spælarum, sum vanliga spæla í Grikkalandi, og tí var eisini greitt, at Kjartan Eli hesa ferð kom at møta sterkari mótstøðu, enn hann vanliga hevur gjørt.

Og tað varð eisini ein spælari á liðnum hjá Rhodos, sum steðgaði Kjartani Eli. Talan var um greiðan sigur, og so mátti Kjartan Eli fyri fyrstu ferð síðani 1999 fara av oyggjaleikum uttan nakað heiðursmerki.

## 30 sekund frá bronsuni

**Torkil Veyhe súkklaði seg til eitt flott áttanda pláss, og føroyska liðið gjørdist nummar fýra, tá einkultstarturin í súkkling var á skránni hósdagin**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan var enn eina ferð um flott avrik, tá føroysku súkklararnir vóru í síni seinastu kapping hósdagin. Hetta var einkultstarturin, og enn einaferð prógvaði Torkil Veyhe, at hann er í ferð við at menna seg til ein sera habilan súkklara í hesi sergreinini.

Torkil kom á mál bara 30 sekund uttan fyri heiðurs-merkjarøðina, og gjørdist hann nummar átta av teimum 52, sum fullførdu teinin.

Hartil var um reppið, at føroyska liðið eisini vann heiðursmerki á einkultstartinum, men soleiðis skuldi tó ikki verða.

Men tómhentir fóru føroysku súkklararnir tó ikki heim. Eftir einkultstartin fingu teir handað silvurmerkini, sum teir vunnu fyri liðsúkklingina á landavegnum. Einn kæra um aðrar súkklarar kundi havt broytt hetta til gull, men hendan varð ikki gingin á møti.

*Úrslitini í einkulstartinum*

| Nr | Súkklari | Tíð |
|---|---|---|
| 8 | Torkil Veyhe | 54,46 |
| 12 | Gunnar Dahl-Olsen | 55,46 |
| 27 | Bogi Kristiansen | 57,39 |
| 39 | Eli Christiansen | 1.00,28 |
| 45 | Sigmund Olsson | 1.04,41 |

# Funnu green'ina

**Málið, sum føroysku golfspælararnir settu sær undan oyggjaleikunum, varð rokkið, tá føoyingar hildu seg burtur frá aftasta plássinum**

GOLF
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Rói H. Christiansen gjørdist besti føroyingurin í golfkappingini á oyggjaleikum. Rói gekk tær fýra ferðir 18 holini í 371 sløgum, og tað setti hann á eitt 57. pláss í samlaðu støðuni.

Næstur honum av føroyingunum var Jónfinn Thomassen, sum við 416 sløgum gjørdist nummar 60.

Triði føroyingurin í golfkappingini varð Ragnar Isaksen, sum við 445 sløgum gjørdist nummar 67.

Samanlagt gjørdist føroyska liðið nummar 16 av 17 liðum.



*Føroysku golfspælararnir høvdu ongar dreymar yvir høvur um heiðursmerki, men við at halda botninum undir sær rukku teir málinum, sum teir høvdu sett sær*
*Mynd: Álvur Haraldsen*